# Søkt verður eftir fólki

## at menna heimasíðuna hjá Plátufelagnum Tutl

Starvið umfatar í høvuðsheitum at útbyggja heimasíðuna hjá Plátufelagnum Tutl til eitt veruligt sølutorg fyri allan føroyskan tónleik.

**Arbeiðsuppgávurnar verða m.a. at**

- savna saman upplýsingar um føroyskan tónleik at leggja á síðuna.
- Dagføra síðuna við tíðindum sum t.d. konsertætlanum.
- Leggja inn ljóðdømi av ymisku føroysku útgávunum og møguliga videoklipp.
- Umsita fløgusøluna á heimasíðuni.

Føroyskur tónleikur, sum er útgivin av øðrum enn Plátufelagnum Tutl, fær eisini innivist á hesi síðuni.

Starvið verður lønt til 30 tímar um vikuna og í fyrstu atløgu í 12 mánaðar. Starvsfólkið skal hava bústað í Føroyum, og duga at arbeiða sjálvstøðugt bæði v.v. teldukunnleika og innsavningararbeiði.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at skriva til: info@tutl.com

Umsóknarfreist er tann 15. september 2002.

Umsóknir skulu sendast tin : info@tutl.com ella til

**Plátufelagið Tutl**
Reyngøta 12
100 Tórshavn

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3425
Navn: Sp/f Ítróttakjarnin
Adressa: Við Gálgastein 2, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 21.08.2002
Viðtøkudato: 21.08.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: :
Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Alma á Lava, Við Gálgastein 2, 100 Tórshavn.
Stjórn: Alma á Lava, Við Gálgastein 2, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift stjórans.
Grannskoðari: : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.02. - 31.01
Fyrsta roknskaparár: 21.08.2002 - 31.01.2003
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 4. september 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3428
Navn: Sp/f CJJ
Adressa: 470 Eiði
Kommuna: Eiðis Kommuna
Stovningardato: 01.09.2002
Viðtøkudato: 01.09.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: :
Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Christian Jacobsen, 470 Eiði.
Stjórn: Christian Jacobsen, 470 Eiði.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Grannskoðan Jóannis Skorheim, Klaksvíksvegur 28, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.09.2002 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka fasta ogn, handil, fiskivinnu og útleigan og annað virksemi í hesum sambandi

Skráseting Føroya tann 4. september 2002

Kristin Balle

# LBF søkir verkfrøðing og teknikara

Vit søkja ein dugnaligan verkfrøðing til okkara nógvu fjølbroyttu og spennandi projekteringsog eftirlitsuppgávur innan byggi- og anleggsfakini.

Eisini søkja vit ein dugnaligan byggifrøðing ella tekniskan teknara til teknideild okkara.

Arbeiðið umfatar fjølbroytt tekniarbeiði við frammkomnari cad-útgerð. Luttøka í øðrum tekniskum arbeiði, kann eisini koma upp á tal, í mun til tann førleika sum umsøkjarin hevur.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til Hanus Hansen á telefon 314744.

**Landsbyggifelagið P/F, Ráðgevandi Verkfrøðingar**
Grønlandsvegur 5 · Postboks 228
110 Tórshavn
E-mail: lbf@lbf.fo

# Tekniskur leiðari

Søkt verður eftir tekniskum leiðara til Sjóvar kommunu.

Viðkomandi skal umsita dagligu teknisku umsitingina í tøttum samarbeiði við arbeiðsfólkini hjá kommununi.

Fyrimunur er, um umsøkjari er handverkari, hevur teldukunnleika og praktiskar royndir.

Umsóknir verða at senda til Sjóvar kommunu innan 17. sept. 2002.

**Sjóvar kommuna**
490 Strendur
Tlf. 447158
e-mail: sjk@kallnet.fo

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

# Limafundur

verður mikukvøldið 11. september kl. 19.30 í hølinum hjá Starvsmannafelagnum í J. H. Schrøtersgøtu 9.

Á skránni verður Landsfundurin og politiskt orðaskifti.

**Nevndin**

Dansifrøi

# Dansiskeið

***Um nóg nógv tekna seg, skipar Dansifrøi fyri dansiskeiði í auluni á studentaskúlanum í Hoydølum.***

Bólkarnir verða hesir:

Týskvøld
bólkur 1: 18.00 til 19.00. Barnahold 10-13 ár, Sharon Weiss og Hilmar Joensen
bókur 2: 19.00 til 20.00. Argentinskur tango, Anne Lise og Mads A. Winther
bólkur 3: 20.00 til 21.15, Blandað hold við livandi tónleiki, Sharon Weiss, Kristian Blak og Hilmar Joensen
bólkur 4: 21.15 til 22.15. Ymiskir dansir, framhald, Mia Cameron, Arnfríða og Jørgen Rubeksen

Mikukvøld

bólkur 5: 19.00 til 20.00, 14-16 ár, hip hop/funkshowdance
bólkur 6: 20.00 til 21.00, 17-21 ár, nýmótans dansur so sum cha cha cha, rock o.l.
bólkur 7: 21.00 til 22.00, latínamerikanskir og standard dansir. Dansileiðari: Jeannet Bülow

Hóskvøld
bólkur 8: 19.00, byrjarar
bólkur 9: 20.00, tey, ið hava dansað 2 ár ella meira
bólk. 10: 21.00, tey, ið hava dansað í fleiri ár. Dansileiðarar: Jógvan Martin og Ruth Mørk, Matilda og Tom Nielsen

Tilmelding
Bólkur 1 og 3: hjá Sharon Weiss og Kristian Blak, tlf. 314815 og Hilmar Joensen, tlf. 217119
Bólkur 2: hjá Anne Lise og Mads Winther, tlf. 315310, og Erling Jørgensen, tlf. 316063
Bólkur 4: hjá Miu Cameron, tlf. 316080, og Arnfríðu og Jørgen Rubeksen, tlf. 315231
Bólkur 5, 6 og 7: hjá Ann-Mary á Rógvi Rasmussen, tlf. 317243
Bólkur 8 og 9: hjá Jógvan Martin og Ruth Mørk, tlf. 316125
Bólkur 10: hjá Matildu og Tom Nielsen, tlf. 318529

Kostnaður fyri dansiskeiðið fram til jóla, ið er 10 ferðir, er kr. 250,-.
Dansiskeiðið byrjar týskvøldið 24. september. Tó bólkur 2 og 4 týskvøldið 1. oktober 2002.

Áhugað verða biðin um at tekna seg sum skjótast.

*Við dansikvøðu*
**Nevndin**

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA



# Søkt verður eftir fólki til skaða- og tryggingardeildina

Starvið er í høvuðsheitinum at sýna skaðar á akfør og farm.
Eisini skal viðkomandi gera upp og hava eftirlit við møguligum umvælingum av skaðum.

Ert tú miðvís/ur, arbeiðssom/samur, tolin, hevur útbúgving og royndir í at sýna og umvæla skaðar, í góðum árum og ynskir at hoyra meira um starvið, so skriva nøkur orð um teg sjálvan og fá eina samrøðu við okkum.
Alt verður viðgjørt í trúnaði.

Umsóknarfreistin er 12. september 2002.

**SMYRIL LINE**
att.: stjórnin
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

**`Spennandi starv sum frítíðar- ella heiltíðar-**

# forhandlari

Í sambandi við at vit skul lata upp nýggja deild í Føroyum, søkja vit eftir fólki, ið eru áhugað í at arbeiða sum sjálvstøðug/ur forhandlari, antin sum frítíðar- ella heiltíðarstarv.

Vit kunnu bjóða tær:

- Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv, har tú fært høvi til at vísa tíni evnir og hugflog.
- Eitt starv, har tú sjálv/ur avger, nær tú arbeiðir.
- Góða løn til tann rætta persónin.
- Eitt starv í einari heimsumfatandi fyritøku, sum arbeiðir í yvir 30 londum.

Vit vænta okkum av tær:

- Kanst arbeiða sjálvstøðug/ur við fjølbroyttum hugflogi.
- At tú framhaldandi kanst skapa eina spennandi, tiltalandi, nøktandi og kundavinarliga deild, sum í dag hevur sera gott orð á sær.
- Ert kundavinarligur og opin fyri nýggjum avbjóðingum.
- Ert yvir 18 ár.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 373496 ella (0045) 4083 0479 – spyr eftir Petur Jacobsen.

**P. J. Marketing**
v/ Petur Jacobsen

# Tilboð ynskist

uppá at stoypa nýggja rætt fyri Ytra part í Skálafjalli. Tilfar fæst við at venda sær til Jóan Petur Hansen, 44 15 75, best eftir kl. 17.00. Tilboðini skulu sendast til, Hagastýrið fyri Ytra part í Skálafjalli v/ Jóan Petur Hansen, 485 Skálafjørður.

**Hagastýrið**

# Bilur til sølu



VW Passat 1.9 TDI, 115 HK metallicgrønur, 3 ára gamal, sum nýggjur. Til sølu fyri kr. 180.000. Eyka sett av felgum við píkadekkum fylgir við.

**Tlf. 223232**

# Eysturoyar Røktar- og ellisheim

**620 Runavík**

Søkt verður eftir

**deildarleiðara** at byrja 01.11.02 ella eftir nærri avtalu.

Umsøkjarin skal hava sjúkrasystraútbúgving.

Umsøkjari við leiðsluroyndum og royndum innan eldraøkið hevur fyrimun.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið o g Sjúkrasystrafelag Føroya.

Umsókn saman við prógvi, viðmæli o.a. skal verða komið okkum í hendi innan 24.09.02.

Nærri starvinum viðvíkjandi fæst at vita frá fyristøðumanninum á tlf. 448185 ella 448201.

# Eysturoyar Røktar- og ellisheim

**620 Runavík**

Søkt verður eftir persóni at **vaska/viðlíkahalda** búfólkaklæði.

Arbeiðsbrøkur: 30 tímar um vikuna.

Løn sambært sáttmála hjá FA.

Umsóknarfreist: 21.09.02

Nærri starvinum viðvíkjandi fæst at vita frá fyristøðumanninum á tlf. 448185 ella 448201.

# Bakaralærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan bakarayrkið, hava vit eitt læruppláss at søkja.

Bakaríið hjá Gunleivi hevur eina sera fjølbroytta framleiðslu innan alt bakarahandverk, har tú kemur at arbeiða í einum góðum arbeiðsumhvørvi saman við nógvum røskum fólki.

Bakaralæran er ein fjølbroytt útbúgving, ið gevur fleiri framtíðarmøguleikar. Nøkur velja at halda fram, har tey hava lært, meðan onnur vilja royna okkurt annað. Eitt nú starvast fleiri bakarar umborð á cruise-skipum, í oljuvinnuni og innan hotelvinnuna.

Bakaralæran gevur eisini møguleika fyri víðariútbúgving, til m.a. proceseteknolog.

Lærutíðin til bakara er 4 ár, harav 35 vikur á tekniskum skúla.

Ætlanin er at tú skal byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**BAKARÍIÐ HJÁ GUNLEIVI**

**Tlf. 228838 ella 312161**

# Advokatskrivaranæmingur

Søkt verður eftir advokatskrivaranæmingi at byrja 1. oktober 2002. Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum verður at senda til Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøtu 9, Postboks 6, 110 Tórshavn.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja 31 11 45 og spyrja eftir Óla Jákup Kristoffersen, e-mail ojk@advlaw.fo ella Heidi Hammer, e-mail: hjh@advlaw.fo

**Advokatskrivstovan**
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145
att.: Óla Jákup ella Heidi

# Til sølu



Daihatsu Rocky 06/96.

**Tlf. 44 75 43**